## United eftir Villa

Spanski álopsspælarin, David Villa, hevur seinnu árini verið eitt tað heitasta navnið í europeiskum fótbólti, og nú ganga søgur um, at Manchester United er til reiðar við einum rimmar tilboðið. Enskt blað skrivar, United fer at bjóða 330 milliónir krónur fyri Villa í summar. Ætlanin er, at tilboðið skal latast fyri HM-kappingina í Suðurafrika, tá teir bestu spælararnir ofta gerast enn dýrari.



## Milan kiksaði

AC Milan hevði um vikuskiftið møguleika at leggja seg á odda í italsku landskappingini. Inter, sum hevur verið langt fremst, hevur mist fleiri stig seinastu vikurnar, og AC Milan hevur fingið nógv burtur úr sínum dystum. Men nú Milan kundi fara fram um Inter, kiksaðu teir strípútu. AC Milan spældi ímóti Napoli, og dysturin endaði 1-1. Inter er tí framvegis eitt stig á odda í Seriu A.



**Gert Hansen fekk undan, tá KÍF í Vestmanna syrgdi fyri, at lív enn er í finalumøguleikanum**
Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# VÍF tók ikki av

**Kollfirðingar vunnu á VÍF í gjár. Tí eru tað fýra lið, sum komandi vikuskiftið fara at kappast um pláss í FM-finaluni**




Uni Holm Johannesen

Vestmenningar vóru í gjár steðgaðir á málstrikuni. Eftir fýra sigrar upp í slag hevði VÍF møguleikan at vinna seg í FM-finaluna, men KÍF syrgdi fyri, at avgerðin ikki fall hetta vikuskiftið.

Kollfirðingar vunnu við 26-24 í Vestmanna. Tað fekk lív í aftur vónina hjá KÍF, StÍF og Kyndil at røkka finaluni.

Fyri steðgin var líkt til, at VÍF fór at vinna neyðugu stigini at sleppa í finaluna. Men í seinna hálvleiki vóru tað gestirnir úr Kollafirði, sum dugdu betur at halda høvdið kalt. Fleiri ferðir stóð á jøvnum, og tá 10 minuttir restaðu í, eydnaðist tað KÍF at leggja seg á odda.

Vestmenningar svaraðu aftur tvær ferðir, men tá KÍF skutu trý mál upp í slag, var leyst og liðugt. Tá kundu kollfirðingar fegnast um, at møguleikin fyri plássi í FM-finaluni framvegis er á lívi.

Komandi vikuskifti skal Neistin vitja í Vestmanna. Steypavinnarannir hava sum heild verið stórspælandi í hesum kappingarárinum, og geva bláu havnarmenninir seg fult út, er tað eingin í føroysku kappingini, sum stendur teimum kurl.

Tí er spurningurin, um VÍF, sum hevði besta møguleikan, nú hevur ringastu líkindini at vinna seg í finaluna. Tí Neistin ætlar sær helst ikki at tapa tveir dystir upp í slag áðrenn finalurnar.

Tað er í øllum førum lagt upp til eitt sera áhugavert hondbóltsvikuskifti.

# StÍF livir í vónini

**StÍF vann óvæntað á oddaliðnum og livir framvegis í vónini at røkka finaluni**




Uni Holm Johannesen

Tað varð ikki væntað, at StÍF fór at standa oddaliðnum kurl, men púra óvæntað hava strandingar framvegis møguleikan at sleppa í finaluna. StÍF vann í gjár við heili sjey málum á útivølli móti Neistanum, og tað sást týðiligt frá byrjan, at gestirnir høvdu nógv meira at spæla fyri. Strandingar vóru til reiðar frá byrjan og loyvdu ongantíð oddaliðnum at renna undan.

Fyri steðgin gekk javnt á, men miðskeiðis í seinna hálvleiki rann StÍF undan. Munurin øktist javnt og samt, og við trivaliga sigrinum halda strandingar framvegis lív í vónini um at sleppa í finaluna.

Marian Cirloganescu var dagsins maður hjá StÍF. Málverjin hevði fleiri týdningarmiklar bjargingar, sum hevði við sær, at Neistin ongantíð vann sær eina trygga leiðslu í fyrra hálvleiki.

Dysturin í gjár var týðiligt dømi um, at Neistin hevur einki at spæla fyri. Bláu havnarmenninir tóktust ikki serliga tendraðir, og meðan tað stóð á í seinna hálvleiki vildi eingin taka ábyrgd. Tað var ikki líkasæla, men tað var torført at seta seg upp, tá úrslitið sum so onga ávirkan hevur.

Alexandur Johansen, venjari hjá StÍF, staðfestir á heimasíðuni hjá Neistanum, at strandingar komu fyri seg í seinna hálvleiki, runnu undan Neistanum og vunnu uppiborið: – Vit høvdu tol og lupu ikki framav. Vit gjørdu okkum dælt av verjuvillunum hjá Neistanum, samstundis sum vit stóðu væl í verjustøðu, sigur venjarin.

# H71 er úti

**Føroyameistararnir eru einasta liðið, sum ikki hevur møguleikan at vinna seg í finaluna**




Uni Holm Johannesen

H71 fer ikki at endurvinna føroyameistaraheitið. Tað fingu hoyvíkingarnir staðfest í síni egnu borg seinnapartin í gjár, tá teir taptu við einum máli móti Kyndil í einum dysti, sum teir ikki høvdu ráð at tapa.

Fyri steðgin var Kyndil greitt omaná, men hoyvíkingar togaðu seg aftur í dystin, og seinastu 20 minuttirnar var munurin sera lítil. Men tað eydnaðist ongantíð heimaliðnum at vinna seg upp á javnleikin, og tí mugu teir ásanna, at teirra leiklutur í kappingini um føroyameitaraheitið er av.

Kyndil vísti fyrimyndarligan stríðsvilja í stórum løtum av dystinum. Teir vóru treiskir og ágrýtnir og góvu hoyvíkingum einki annað val enn at renna aftaná.

Kyndil tevjar nú aftur finalupláss. Komandi vikuskifti fáa sigursvandu havnarmenninir vitjan av StÍF. Fyrst og fremst noyðist Kyndil at fáa hjálp frá grannunum úr Neistanum, sum skal vitja VÍF. Vestmenningar mugu tapa sín dyst, um hini liðini yvirhøvur skulu hava møguleikan at vinna seg í finaluna.